| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 02. apríl 2009 |
| Býráðsfundur nr. | 03/2009 |
| Borgarstjóri | Sigurð S. Simonsen |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2009 tann 02. apríl kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 27. mars 2009 um innkalling til fundar. Talan er um útsetta býráðsfundin frá 26. mars 2009, sí teldupost til býráðslimirnar, dagfestur 19. mars og kunngerð 20. mars 2009.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Jann Toftegaard
Kristina Toftegaard Larsen
Elisabeth D. Eldevig Olsen
Eyðun á Lakjuni
Magnus Midjord
Petur Abrahamsen
Sonnni á Horni

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 12/2009.**

**Mál viðvíkjandi verkætlanini hjá Frits Johannesen um barnalund í Fuglafirði.**

Á fundi í mentamálanevndini tann 27. mars 2009 varð málið um "barnalundina" hjá Frits Johannesen til umrøðu í mentamálanevndini.

Fyri at fáa málið lýst frá ymiskum sjónarhornum, hevði nevndin eftir fund tann 16. februar 2009 biðið býarverkfrøðingin um at tekna lundina í trimum ymiskum staðsetingum: "Við Torkilskrók, oman fyri bakaríið og í miðstaðarlundini". Tekningarnar, ið eru viðheftar hesum tilmæli, vórðu nýttar í orðaskiftinum á fundinum 27. mars 2009.

Býarverkfrøðingurin varð biðin um at taka atlit til parkeringsviðurskifti við Torkilskrójk, og hevur hann tí teknað trý ymisk uppskot um hetta øki. Tó varð niðurstøðan á fundinum tann, at støða ikki skal verða tikin til parkeringsviðurskifti við Torkilskrók í hesum høpinum, einans staðseting av barnalundini.

Niðurstøðan á fundinum er, at nevndin vísir á tveir møguleikar: annaðhvørt við Torkilskrók, har víst verður á viðurskifti um parkering væntandi verður reist seinni, ella á eystara áarbakka við Gjógvará millum brýrnar, sum í byggisamtykini er útlagt sum frílendi.
Arbeiðið við at fyrireika økið, eitt nú við gøtum, eigur at verða gjørt av ungum í arbeiði.

Mentamálanevndin mælir til, at býráðið tekur støðu millum uppskotini bæði.

Tekniska nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 11. februar 2009, og mælir nevndin býráðnum til, at økið í "Miðstaðarlundini" oman fyri Bókasavnið niðan móti kirkjuni verður nýtt til verkætlanina, grundað á at nevndin er av teirri sannføring, at hetta er best egnaða og sentralasta økið í býnum til endamálið.

Við eini plasering á hesum øki verður mett, at "Miðstaðarlundin" verður meira vitjað sum útiveruplass enn higartil.

Sostatt er talan um 3 tilmæli nevndiniga:
1. Økið í Torkilskróki.
2. Økið á eystara áarbakka við Gjógvará.
3. Økið í Miðstaðarlundini millum bókasavnið og kirkjuna. Hetta uppskot er slept.

**Avgerð:**
Borgarstjórin kom á fundinum inn á, at møguleiki eisini varð fyri at leggja "barnalundina" á økið millum Skarðsá og grundstykkið hjá Ellinti Abrahamsen, t.v.s. frá gamla tarvhúsinum og vestureftir, og at kommunan ger avtalu við viðkomandi, um at kommunan kann ogna sær lendið við umbýti við grundstykki.

Elisabeth tók uppskotið um økið eystan fyri Gjógvará aftur, grundað á at ognarviðurskiftini ikki eru í lagi, og at kommunan ikki hevur avsett neyðugan pening til keypið á fíggjarætlan kommununar fyri 2009, og bað somuleiðis sum at fáa viðmerking um hesi viðurskifti í gerðabókina.

Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá mentanarnevndini um, at økið í Torkilskróki verður staðsett til barnalundina, tó við teirri viðmerking, at atlit verður tikið til møgulig parkeringsviðurskifti á økinum. Eitt møguligt projekt um møgulig parkeringspláss verður lagt aftur fyri býráðið til støðutakan av teknisku nevndini. (9-0).

**Mál nr. 13/2009.**

***Møgulig eykajáttan til rakstur av Mentanarhúsinum 2009 og viðurskifti í sambandi við kannan av møguleikum fyri umlegging av láni úr Norðoya sparikassa.***

Nevndin fyri Fuglafjarðar sjónleikarafelag og umboð fyri Fuglafjarðar kommuna hava verið á fundi tann 11. februar 2009, har umboðini fyri Sjónleikarafelagið greiddu frá fíggjarstøðu felagsins og framtíðarætlanum, somuleiðis sum kommuumboðini eisini fingu avrit av rakstrarroknskapi fyri Mentanarhúsið fyri 2008 útgreinaður á hvønn ársfjóðring, somuleiðis sum statusurin eisini varð útgreinaður pr. 31. desember 2008.

Tað vísir seg, at lán felagsins úr Norðoya sparikassa nr. 9865-039.034.2 er rættuliga kostnaðarmikið, rentan er í løtuni sambær uppgerð Cibor + 4,75%, svarandi til eina meðalrentu í 2008 upp á umleið 10,0% p.a., og hesi viðurskifti føra við sær, at lánið ikki minkar so skjótt sum tað átti. Sjónleikarafelagið heitti á umboð kommununar um at hjálpa felagnum annaðhvørt at fáa avtalað lægri rentu ella at fáa lánið umlagt.

Upplýsast skal í hesum høpi, at kommunan á fíggjarætlanini fyri 2008 og 2009 hevur avsett kr. 550.000,00 til rindan av kapitalútreiðslum av omanfyri nevnda láni, men sambært avtalu millum Sjónleikarafelagið, kommununa og Norðoya sparikassa primo 2008, so varð avtalað gjørd partanna millum um, at kr. 400.000,00 skuldu fara til lánsgjøld, meðan kr. 150.000,00 skuldu verða nýttar til viðlíkahald/umsiting av bygningi vm. Hetta varð annars krav, sum Norðoya sparikassi hevði sett nevndini fyri Fuglafjarðar sjónleikarafelag (kr. 80.000,00 árliga), men varð henda avtala ongantíð realiserað tíverri.

Sambært lánsyvirlitinum pr. 31. desember 2008, so skyldaði Fuglafjarðar sjónleikarafelag Norðoya sparikassa kr. 4.195.026,07 (útlán 039.034-2), og sambært hesum er skuldin í 2008 økt við kr. 5.879,44 úr kr. 4.189.146,63 upp í kr. 4.195.026,07, so inngjaldið frá kommununi til lánið upp á kr. 400.000,00 hevur ikki verið nóg mikið til at dekka rentuútreiðslurnar tíverri.

Annars stuðlar kommunan Mentanarhúsinum á annan hátt, m.a. við leigu av hølum til ymisk tiltøk, vinnu- og handilsfundir, ráðstevnur vm., somuleiðis sum kommunalir stovnar eisini hava nýtt høvi til at leiga húsið.

Á fundinum partana millum 11. februar h.á. framgekk eisini, at nevndin fyri Mentanarhúsið er rættuliga troytt, og at vandi er fyri, at hon fer at leggja frá sær á komandi aðalfundi, sum lýstur er at verða 18. februar 2009. Tó metir nevndin, at nøkur viðurskiftu kunnu verða betrast munandi og sostatt lætta um arbeiðið hjá nevndini, men hetta krevur eina rakstrarjáttan áljóðandi kr. 100.000,00.

Mentamálanevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 16. februar 2009 og er nevndin samd um, at nevnd Fuglafjarðar sjónleikarafelagsins hevur gjørt eitt megnar arbeiði, og at nevndin er sinnað at stuðla felagnum í arbeiðinum í framtíðini.

Nevndin mælir tí býráðnum til at hjálpa felagnum at fáa avtalaða lægri rentu, ella at fáa umfíggjað útlánið og haraftrat lata eina eingangsupphædd til Mentanarhúsið áljóðandi kr. 100.000,00 aftrat játtaða stuðlinum upp á kr. 550.000,00.

Í góðkendu fíggjarætlanini fyri kommununa fyri 2009 er eingin peningur beinleiðis avsettur beinleiðis til hetta endmál, og verður tí heitt á fíggjarnevndina um at heita á býráðið um at veita eina eykajáttan upp á kr. 100.000,00 á konto 450010 "Stuðningar hjá mentamálanevndini at ráða yvir"., so játtanin verður hækkað úr kr. 650.000,00 upp í kr. 750.000,00.

Fyrisitingin hevur ikki latið sítt tilmæli í málinum, grundað á at sera trupult er at finna fígging av teimum kr. 100.000,00 í eykajáttan, sum mentamálanevndin mælir til. Fyrisitingin staðfestir, at eingin tøkur innistandandi peningur er til fíggingina, rakstratjáttarnirnar eru lækkaðar munandi frá 2008 til 2009 (meðal 15%), kommunan hevur ikki heimildir at lána til rakstur, kommunuskattaprosentið kann ikki broytast, eftir at tað er lagt 01. desember, hvussu útlitini eru fyri at fáa metta kommunuskattin inn er ivasamt, tá ið stutt er liðið av árinum, somuleiðis sum eisini ivasamt er um kommunan kemur at fáa meiri ella minni inn í partafelagsskatti enn mett. Almennu

útlitini fyri meirinntøku í skatti fyri 2009 eru sera vánlig, og um hetta verður staðfesting, so kemur kommunukassin eisini at hava trupulleikar at halda seg til góðkendu játtanirnar.

Tá ið talan er um eina eykajáttan, so skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri, og skal endaliga viðgerðin verða kunnað Innlendismálaráðnum í seinasta lagi 3 dagar aftan á samtyktina við 2. viðgerð, hetta sambært § 53, stk. 2,3 í somu lóg.

Ein tílík eykajáttan kemur at bera eykaútreiðslur við sær fyri kommunukassan, um so verður, at henda verður fíggjað av innistandandi peningi, og kemur tessvegna at ávirka roknskaparliga rakstrarúrslitið við nevndu upphædd fyri árið 2009. Verður eykajáttanin veitt við lækkan av játtanum, so er eykajáttanin útreiðsluneutral.

*Niðurstøða á fundi í fíggjarnevndini 19. februar 2009:*

Nevndin samtykti at útseta viðgerðina av málinum um møguliga eykajáttan til seinni fund, grundað á at viðuskiftini, sum nevnd eru niðanfyri, eitt nú fund við lánstovnar umfíggjan av av láninum hjá Fuglafjarðar sjónleikarafelag, fund við Norðoya sparikassa um lægri rentu, betri lántreytir vm. skuldu verða kannað nærri, áðrenn endalig viðgerð verður og tilmæli latið býráðnum.

Sum omanfyri lýst, so verður neyðugt at taka upp fund við Norðoya sparikassa saman við Sjónleikarafelagnum um broytan av lánstreytunum við eitt nú at lækka rentuna og hækka árliga lánsgjaldið við kr. 70.000,00 úr kr. 400.000,00 upp í kr. 470.000,00, og at umvælingarjáttanin verður lækkað úr kr. 150.000,00 niður í kr. 80.000,00.

Somuleiðis verður heimilað fyrisitingini at taka upp fund við aðrar fíggingarstovnar um møguliga at lána Fuglafjarðar sjónleikarafelag skuldarupphæddina til lægri rentu enn útlán nr. 039.034-2 til Norðoya sparikassa (Cibor + 4,75% p.a.), og at verandi lán á hátt kann verða innfría. Tó má hædd eisini verða tikin fyri, hvussu stóra peningaupphædd sparikassin møguliga tekur fyri innfrían av láninum).

Vísandi til niðurstøðuna í fíggjarnevndini hevur býráðsleiðslan havt fund við Lív tann 19. februar 2009, sí hjálagda notat, og sambært hesum framgongur, at niðurstøða teirra er, at stovnurin ikki er sinnaður at veita lán til Fuglafjarðar sjónleikarafelag til útgjaldingar av verandi láni í Norðoya sparikassa. Stjórin í Lív metir sjálvur bestu loysnina verða, at kommunan yvirtekur Mentanarhúsið, og tá eru teir sinnaðir til at viðgerða eina umsókn frá kommununi sum eigara positivt.

Um so verður, at umsókn kemur inn frá Fuglafjarðar sjónleikarafelag um lánsveiting, so verður kravið frá Lív, at kommunan veðheldur fyri einum evt. láni. Til hesi viðurskifti er at siga, at kommunan sambært galdandi kommunulóg frá 17. mei 2000 ikki hevur heimild til veðhøld, hvørki fyri privat, feløg ella stovnar. Fyri møguliga at víkja frá nevndu ásetingum verður neyðugt, at kommunan fær loyvi frá Fíggjarmálaráðnum til veðhaldi, og hetta verður mett nærum ógjørligt at fáa loyvi til, tí eitt tílíkt loyvi kemur at skapa fyridømi fyri aðrar líknandi umsóknir frá øðrum kommunum.

Fundur hevur tann 15. februar 2009 verið millum býráðsleiðsluna og umboð fyri Norðoya sparikassa, sí hjálagda notat, og sambært hesum er talan um vinnulán, sum Fuglafjarðar sjónleikarafelag hevur tikið við núverandi rentu áljóðandi 9,645 % p.a. Sparikassin er ikki sinnaður at leggja lánið um til lægri rentu, men er tó sinnaður til at viðgerða eina møguliga rentulækking, um so verður at kommunan framyvir kemur at rinda kr. 800.000,00 árliga inn á lánið fyri rentur og avdráttir.

Umboð sparikassans koma eisini inn á spurningum, eins og Lív um møguleikar kommununar at yvirtaka Mentanarhúsið, og tá eru eingir trupulleikar við at veita kommununi nýtt lán við lægri rentu – 2,5-3%-um lægri enn verandi lán, t.v.s. 6,5-6,7%-um ella har á leið. Eisini kann talan verða um møguliga rentulækking, um so verður, at kommunan kemur at veita veðhald fyri láninum. Sí viðm. Í kommunulógini um kommunal veðhald vm.

Avtalan millum Norðoya sparikassa og kommununa frá januar 2008 um, at kr. 400.000,00 skulu rindast inn á lánið, meðan kr. 150.000,00 skulu verða nýttar til umvælingar vm. av Mentanarhúsinum er bert galdandi fyri 2008. Fyri 2009 hevur sparikassin kalkulerað við kr. 470.000,00 í lánsgjøldum ella kr. 117.500,00 um ársfjóðringin, meðan kr. 80.000,00 verða nýttar til umvælingar vm..

Sum fíggjarliga støðan er í løtuni við rindan av kr. 470.000,00 árliga, so verður afturgjaldstíðin av láninum sera long, men við rindan av kr. 550.000,00 í kapitalútreiðslum verður mett, at afturgjaldstíðin við verandi annuitetsláni verður umleið 18 ár.

**Niðurstøða á fundi í fíggjarnevndini 26. mars 2009:**

Nevndin varð á fundinum samd um, at játtanin, sum samtykt er at lata Fuglafjarðar sjónleikarafelag upp á kr. 550.000,00 fyri 2009, ikki verður broytt, men at kr. 470.000,00 verður rindaðar Norðoya sparikassa beinleiðis fyri kapitalútreiðslur til útlán nr. 039.034-2, meðan kr. 80.000,00 verða avsettar til viðlíkhald og uppgraderigar av Mentanarhúsinum.

Ein samd nevnd mælir býráðnum til at veita Fuglafjarðar sjónleikarafelag eina eykajáttan upp á kr. 100.000,00 til rakstur sum eina eingangsjáttan, og at játtanin til "Studningar hjá mentamálanevndini" konto 450010 verður hækkað úr kr. 650.000,00 upp í kr. 750.000,00, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgringslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri.

Vísandi til § 41, stk. 2 mælir nevndin til, at eykajáttanin verður fíggjað av konto 610050 "Menningardeildin" undir kommunalu fyrisitingini. Samtykta játtanin fyri 2009 er kr. 200.000,00, men verður við eykajátanini lækkað niður í kr. 100.000,00. Játtanin krevur 2 býráðsviðgerðir við í minsta lagi 14 daga millumbili.

Talan verður sostatt um eina útreiðsluneutrala játtan, har talan verður um umflyting millum bólk 6 "Kommunala fyrisitingin" og bólk 4 "Skúla- og mentamál" í fíggjarætlan kommununar fyri 2009.

Sambært § 53, stk. 2.3. í kommunulógini skal ein møgulig eykajáttan verðað kunnað Fíggjarmálaráðnum í seinasta lagi 3 dagar aftan á samtyktina við 2. viðgerð.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini og beina málið til 2. og endaliga viðgerð á komandi býráðsfundi, sum hildin verður 23. apríl 2009. (9-0).

**Mál nr. 14/2009.**

**2. viðgerð av uppskoti um broytan av § 31 í kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu.**

Sosiala nevndin hevur á fundi tann 16. februar 2009 viðgjørt málið um tal av limum og varalimum í barnaverndarnevndini, og mælir til eftir uppskoti frá sosialu umsitingini at mæla býráðnum til at broyta § 31, stk. 1 í kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu soleiðis: "Barnaverndarnevndin hevur 3-5 limir" sambr. Lovbekendtgørelsen.

Nú avtalan um samstarv við Leirvík er uppsøgd frá 01. januar 2009 at rokna og virksemi hjá barnaverndartænastuni í Fuglafjarðar kommunu heldur fram, metir umsitingin, at tað er nóg mikið við 3 limum og varalimum í barnaverndarnevndini. Kommunan hevur knapt 1.600 borgarar, og umsitingin er skúlað til allar uppgávur, og arbeiðir hvønn dag.

Sosiala umsitingin metir, at tað er nóg mikið, at tríggir útvaldir borgarar við meðal langari og viðkomandi útbúgvingum eru í nevndini. Umsitingibn ger øll mál klár, áðrenn barnaverndarnevndin viðgerð málini endaliga.

Vísandi til 8. part, ið umrøður "Broytingar í stýrisskipanini o.a." § 35, stendur, at broytingar í kommunustýrisskipanini skal verða viðgjørd á tveimum býráðsfundum við minst 14 daga millumbili. Í hesum sambandi verður víst til uppruna góðkenning býráðsins tann 03. september 2001.

Málið hevur verið til 1. viðgerð á býráðsfundi 26. februar 2009, og varð samtykt at beina uppskotið til broyting í § 31 í kommunustýrisskipanini til 2. og endaliga viðgerð á komandi býráðsfundi. (7-0).

**Avgerð:**
Uppskotið um broyting av § 31 í kommunustýrisskipanini varð samtykt við 2. viðgerð. (9-0).

**Mál nr. 15/2009.**

**Uppskot um broytan av sáttmála fyri Ítróttar- og samkomuhøllina á Kambsdali.**

Fuglafjarðar kommuna hevur heitt á Advokatstovuna um at gera broytingar í sáttmálanum frá 2000 millum Gøtu-, Leirvíkar- og Fuglafjarðar kommunur um Ítróttar- og samkomuhøllina á Kambsdali, nú fyrst nevndu kommunur eftir 01. januar 2009 eru lagdar saman í Eystur kommunu.

Við telduposti, dagfestum 09. mars 2009 frá Eyðbjørn Larsen, advokati verður boðað frá, at hann hevur gjørt uppskot til endurskoðan sáttmála, og at hann hevur lagað sáttmálan soleiðis, at kommunurnar ikki nýtast at broyta upprunaskeytið og lata hetta inn til tinglýsingar av nýggjum.

*Niðurstøða á fundi í fíggjarnevndini 26. mars 2009:*
Nevndin mælir einmælt býráðnum til at góðkenna hjálagda uppskot frá Advokatskrivstovuni til broytan av sáttmála millum Eystur- og Fuglafjarðar kommunur fyri Ítróttar- og samkomuhøllina á Kambsdali frá 2000, soleiðis at samanlagda kommunan eftir 01. januar 2009 kemur inn sum partur fyri Gøtu- og Leirvíkar kommunur.

**Avgerð:**
Tilmæli frá fíggjarnevndini varð samtykt. (9-0).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 19.30.

Dánjal Vang

Jann Tofetgaard

Elisabeth D. Eldevig

Kristina Toftegaard Larsen

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Magnus Midjord

Sonni á Horni

Sigurð S. Simonsen

Skrivari:

Jákup Frants Larsen